ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3Postboks 208
110 Tórshavn

31. januar 2022
Mál: 22/01452-2
Tygara Skriv:
Viðgjørt: BÁT

Nr. 52-116/2021

Svar uppá § 52 a fyrispurning nr. 52-116/2021 frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í almannamálum Sólvit E. Nolsø um ansingarsamsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum

Fyrispurningurin ljóðar soleiðis:

Spurningar:

1. Er nøkur ætlan um, í samráð við og eftir ynski frá kommunum, at hækka viðbótina fyri at ansa eldri og óhjálpnum persónum?
2. Um ja, hvussu nógv er ætlanin at hækka samsýningina, og nær er ætlanin at seta hækkingina í gildi?
3. Er nøkur ætlan um at endurskoða treytirnar fyri at gerast ansari?

Svar:

Eftirmetingin av lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m., lógini um kommunalt samstarv og fíggjarleistinum varð liðug beint fyri jól í 2021.

Í partinum um lógina um heimatænastu, eldrarøkt v.m., hevur arbeiðsbólkurin viðgjørt ansingarsamsýning til persónar, sum átaka sær at ansa fólkapensjónisti, sum hevur tørv á røkt og hjáveru. Hetta er ein veiting, sum kommunurnar kunnu veita, tær eru ikki álagdar at játta hesa veiting. Øll samstarvsøkini veita ansingarsamsýning, men tað eru ikki nógvar umsóknir um hesa veiting og víst verður á, at tørvur er á at hækka samsýningina.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at skipanin við ansingarsamsýning verður endurskoðað. Landsstýrismaðurin fer í næstum at umrøða ansingarsamsýningina saman við kommununum, bæði hvat viðvíkur upphæddini og treytunum fyri at gerast ansari.

Enn er ov tíðliga at siga, hvussu nógv ansingarsamsýningin fer at hækka, og nær broytingarnar koma í gildi. Hetta verður gjørt í samráð við kommunurnar.

Almannamálaráðið, 31. januar 2022

Sólvit E. Nolsø
landsstýrismaður

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo